Fylgiskjal 1

## Uppskot til løgtingslóg um embæti í fólkakirkjuni, samandráttur

### Innihald, samandráttur

Uppskotið fevnir í høvuðsheitum um hesi evni:

- Førleikakrøv til sóknarprestar, próst, dómpróst og biskup
- Setanartilgongd, sóknarprestar,
- Setanartilgongd,próstur (um slíkt embæti verður gjørt) og dómpróstur
- Biskupsval
- Onnur prestaembæti/onnur starvssløg til prestar
- Onnur embæti í kirkjuni, bæði ólønt, samsýnt og lønt
- Størv hjá stiftsstjórnini

Her verður greitt frá uppskotinum í høvuðsheitum, sæð í mun til galdandi løgskipanir, og við serligum denti á áleikandi evni.

### Førleikakrøv til sóknarprestar:

Her eru størstu broytingarnar.
Galdandi fakligt førleikakrav: donsk gudfrøðiútbúgving. Ella onnur gudfrøðiútbúgving, sum skal svara so at siga 100% til danska gudfrøðiútbúgving. Harumframt danska pastoralseminariet.
Galdandi førleikakrøv í Føroyum eru sum tey donsku, tí tey eru gjørd eftir donsku lógini. Donsku førleikakrøvini taka – eins og tey í hinum grannalondunum – støði í gudfrøðiútbúgvingunum á gudfrøðideildunum í egnum landi.

Uppskotið:
Í Føroyum er eingin gudfrøðiútbúgving. Tí kunnu vit ikki gera, sum sjálvsagt er í grannalondunum, og í staðin er uppskotið at áseta førleikakrøvini sum ítøkilig krøv til innihaldið í ymisku pørtunum av útbúgvingini. Umsøkjari til embæti skal hava fylgt lógarásettu lærugreinunum á ásetta ECTS námsstig støðinum (§ 1, stk. 1 og 2).

Krøv eru til á leið tveir triðingar av yvirskipaðu samansetingini av gudfrøðifakum og amboðsfakum í § 1, stk. 2. Hesi verða meira nágreiniliga ásett í kunngerð. Ávegis uppskot til kunngerð er fylgiskjal til lógaruppskotið.
Teir tveir triðingarnir av kravdum innihaldi samsvara nett við tað, sum verandi etableraðu gudfrøðiútbúgvingarnar í gamla dansk/norska ríkinum (Danmark, Noregi og Íslandi) enn hava til felags.
Tí er eisini kunngerðarheimild til at góðkenna útbúgvingar av navnnevndum donskum, norskum og íslendskum universiteti beinleiðis, uttan at meta ítøkiliga um innihaldið í hvørjum einstøkum føri (§ 3, stk. 3).

Harumframt verður verklig prestlæra kravd, t.d. danska pastoralseminariet ella norska praktikum (§ 1, stk. 2, nr. 3).

Umsøkjari skal eisini skilja føroyskt, fyri at kunna verða settur í fast starv (§ 2, stk. 2).

Omaná – ella sum lið í universitetslestrinum – skulu øll taka nám í føroyskari kirkjusøgu, -skipan, -siðum og embætisførslu (§ 2, stk. 1). Hetta krevur, at vit skipa eitt granskarastarv á Fróðskaparsetrinum (kunngerðarheimild til landsstýrismannin tí vv. í § 3, stk. 2).

Ein faklig metingarnevnd skal m.a. meta um allar gudfrøðiútbúgvingar, sum ikki verða nevndar í kunngerðini um at góðkenna etableraðu gudfrøðiútbúgvingarnar í gamla dansk/norska ríkinum. Við verandi lestrarvali verður hetta aktuelt fyri teir allarfægstu gudfrøðingarnar (§ 4 og 5).

Teoretisku (aldrin nýttu) møguleikarnir fyri at kirkjufólk (um undirtøkan er nóg stór) í prinsippinum kunnu kjósa sær hvønn sum helst til sóknarprest, heilt uttan mun til, um viðkomandi hevur nakra útbúgving, halda fram, grundregluliga óbroyttir (§ 1, stk. 3, og § 14).

**Setanartilgongd, sóknarprestar:**
Grundregluliga óbroytt, men leikluturin hjá biskupi verður meira sjónligur og greiður.
Størri dentur verður lagdur á próvhoyringina hjá biskupi ("biskupseksaminatiónina"). Hon er skipað samtala millum biskup og umsøkjara til sóknarprestaembæti, har biskupur tryggjar sær, at hann fer at kunna geva viðkomandi kallsbræv (§§ 7 og 8).
Biskupur skal m.a. í próvhoyringini tryggja sær at kunna svara fyri, at tann, ið settur verður í embæti, megnar at virka innan karmarnar hjá fólkakirkjuni.
Skotið verður upp, at henda próvhoyring skal kunna vera leys av ítøkiligari setanartilgongd. Hon skal hava verið, áðrenn kirkjuráðini síggja umsóknirnar, tvs. at biskupur skal kunna svara fyri eini og hvørjari umsókn, sum hann vegleiðir kirkjuráðini um, áðrenn tey fáa hana til viðgerðar.

Neyvari krøv verða sett til mannagongdirnar í setanartilgongdini, hvussu biskupur og kirkjuráðini skulu upplýsa málini, men kirkjuráðini hava framhaldandi rætt til at "velja við hjartanum", heldur enn samsvarandi skjalprógvaðum formligum førleikum, og til at lata vera við at grundgeva fyri, hví tey ráða til at seta, sum tey gera (§§ 7, 8 og 11 – 13).
Nýggj áseting tryggjar kirkjuráðunum høvi at gera tilráðing av nýggjum, tekur umsøkjari seg aftur (§13, stk. 1).

**Førleikakrøv, próstur, dómpróstur og biskupur:**
Galdandi: Donsk útbúgving ella ein, sum er 100% javnvirðismett við hesa.
Uppskot: Somu formligu krøv sum til sóknarprest. Haraftrat minst 6 ára starvsroyndir sum sóknarprestur í Føroyum, ella samsvarandi. – Hetta seinna er nýtt. Nýtt er eisini kravið um lært nám í føroyskari kirkjusøgu, skipan, siðum og embætisførslu, uttan mun til um kravið var galdandi, tá viðkomandi kom í embæti sum sóknarprestur (§ 22, stk. 1§ 18, stk. 2 og § 20).

**Setanartilgongd, próstur (embæti er ongantíð sett eftir hesi heimildini):**
Galdandi: allir kirkjuráðslimir í próstadøminum ummæla 3 umsóknir, biskupur ummælir 3 umsóknir (ikki bundin av kirkjuráðunum) til landsstýrismannin.
Uppskot: Broytt frá sjálvstøðugum embæti til at vera eykauppgáva, lýst leys millum sóknarprestar í embæti í próstadøminum (einans viðkomandi um fleiri próstadømi verða).
Tilnevndur eftir ummæli biskups til landsstýrismannin (§ 18 og 19).

**Setanartilgongd,** d**ómpróstur og biskupur**:
Óbroytt, men smávegis tillagingar (§ 21, § 22, stk 2, og §§ 23-27).

**Onnur prestaembæti/aðrir setanarformar**
Formliga nýggjur møguleiki til – við góðkenning landsstýrismansins – at velja ørvísi setanarformar, og at seta onnur sløg av prestaembætum, enn vanlig sóknarprestaembæti (§ 9, stk. 2 og 3). Hetta er gjørt áður, tó uttan staðiliga heimild.

Heimild at seta prest í tænastu hjá føroyingum uttanlands og til at røkja serliga tænastu innlendis. Framhald av ásetingum í § 8 í lógini um fólkakirkjuna í Føroyum (§ 15).

**Fólkakirkjuliga vígdur prestur í starvi hjá kirkjuligum felagsskapi**
Galdandi: Tann, ið lýkur førleikakrøvini til sóknarprestaembæti og er í fulltíðar starvi hjá fríum fólkakirkjuligum felagsskapi, kann í serstøkum føri verða prestvígdur, um hetta hevur serstakan týdning fyri kirkjuliga virksemið hjá felagsskapinum. Heimildin hevur ikki higartil verið nýtt her á landi.
Uppskot: Grundregluliga óbroytt, men við heldur neyvari treytum, og við kravi um at gera eitt lítið sindur av tænastu í einum prestagjaldi (§ 16, stk. 1 og 2).

**Heimild at prestvíga granskara/undirvísara**
Tann, ið lýkur førleikakrøvini til sóknarprestaembæti og hevur gransking í Føroyum í føroyskum kirkjuviðurskiftum sum høvuðsstarv, kann verða prestvígdur móti kravi um at gera eitt lítið sindur av tænastu í einum prestagaldi. Løgfesting av samsvarandi fastari danskari siðvenju (16, stk. 1, 3 og 3).

**Bústaðarskylda, sóknarprestur, dómpróstur og biskupur:**
Sum higartil. Tað vil siga, at er embætisbústaður tengdur at kallinum, er bústaðarskylda. Er eingin embætisbústaður, er einki krav. Greiniligari reglur verða settar fyri, nær frávik kann verða gjørt. T.d. tá í mesta lagi 3 ár eru eftir av starvstíðini, og treytað av, at prestur býr í mesta lagi ½ tíma frá "høvuðs-kirkjuni" í prestagjaldinum (§ 28).

**Flutt umsjón ber ikki til:**
Í Danmark kunnu bæði kirkjulið og sóknarprestur koma undir umsjón hjá øðrum biskupi. Hetta til tess at skapa bestu rúmd fyri samtilveru innan karmar fólkakirkjunnar, hóast átrúnaðarliga grundaðar ósemjur innan lærugrundarlagið. Føroyar er skipað sum eitt stift við einum biskupi. Tí er møguleikin ikki til, og heimildirnar hesum vv. verða tiknar av. Neyðugt er tí í størri mun at tryggja fólkakirkjuligu rúmdina (allar vegir) við hugburði í staðin (§ 36, stk 2, triði og sætti táttur,jbr. serstøku viðmerkingarnar).

**Onnur størv í kirkjuni:**
Galdandi: Kunngerðarheimild um samsýningar. – Eingin kunngerð er.
Kirkjusókn við fleiri enn 2000 limum kann seta urguleikara, skrivara og kirkjutænara í starv. Og sóknarprestur kann fáa hjálpara til konfirmatiónsundirvísingina. Er lítið nýtt.
Uppskot: Stiftið umsitir øll mál um samsýning fyri meira enn umleið 12000 kr um árið (heimildin liggur nú hjá kirkjuráðunum).
Annaðhvørt eitt kirkjuráð í kirkjusókn við fleiri enn 2000 limum, fleiri samstarvandi kirkjuráð í kirkjusóknum við tilsamans fleiri enn 2000 limum, ella øll kirkjuráðini í einum prestagjaldi í felag kunnu heita á Stiftsstjórnina um at seta kirkjutænara ella hjálparfólk í starv, og kunu heita á Próstadømisráðið um at størri samsýning verður veitt.
Stiftsstjórnin ger av, um nevndu størv verða sett, ella um tørvurin verður nøktaður á annan hátt, herundir sum samsýnt tænasta, ella í samstarvsavtalu við annan veitara (dømi: avtalu við musikkskúlaskipanina um urguleikara/musikkskúlalærara).
Stiftsstjórnin hevur arbeiðsgevaraheimildirnar, men kann einki slíkt starv seta, uttan at kirkjuráðini vilja tað, og Próstadømisráðið mælir til. Avvarðandi kirkjukassar fíggja.
Øll verða fevnd av tagnarskyldu v.m., jbr kap 8 í fyrisitingarlógini ( §§ 29 – 33).

**Størv hjá stiftsstjórnini:**
Galdandi: Landsstýrismaðurin setir, eftir tilmæli frá stiftinum. – Er delegerað til Stiftið; men FMR/Lønardeildin hevur sama leiklut, sum um talan var um heilt vanligan landsstovn.
Uppskot: Stiftsstjórnin setir, samsvarandi setanar- og lønarviðurskiftunum hjá landinum. – Er betri í samsvari við, at Stiftið fíggjar hesi størv 100% (§ 34).